# Listafólk lata dyrnar upp í Müllers pakkhúsi

**Leygardagin letur listaframsýningin Opnar dyr upp í Müllers pakkhúsi. Á framsýningini verða millum annað oyru hjá blindum og segl úr menniskjahári**

MENTAN
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Framsýningin er eitt samstarv millum framsýningarbólkin Dyr, ið er myndaður av Titu Vinther, Astrid Andreasen og Guðrið Poulsen og tey trý listafólkini Maritu Nattestad, Oggi Lamhauge og Tummas Jákup Thomsen.

– Vit kalla tað Opnar dyr, tí vit eru opnar fyri samstarvi við onnur listafólk, serliga nú so nógv er vorðið smekkað við dyrnum í listaheiminum í seinastuni, siga Guðrið Poulsen og Tita Vinther.

Oggi Lamhauge hevur gjørt eitt listaverk, sum er 100 oyru, stoypt í gipsi, sum eru sett fast á stál plátur.

– Hetta eru oyru hjá blindum fólki. Tey blindu hava ofta sera góð oyru, og á onkran hátt eru oyruni teirra sjón, greiðir Oggi Lamhauge frá.



*Tita Vinther hevur vovið fýra segl av menniskjahári*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Oggi Lamhauge hevur gjørt eitt listaverk av 100 oyrum hjá blindum fólki*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Hann fer at hanga pláturnar upp undir loftið sum eina súlu, og tær fara eisini at koma niður á gólvið og liggja í fýra ættir.

– Eg havi valt at gera listaverkið úr gipsi og stáli. Gipsið er hvítt og viðbrekið, og stálið er hart og kalt. Á henda hátt er tað ein mótsetningur í tilfarinum á listaverkinum.

Eitt annað áhugavert listaverk á framsýningini er verkið "Fram yvir lívsins hav" hjá Titu Vinther. Listaverkið er fýra segl, ið eru vovin av menniskjahári.

– Mær hevur altíð dámt væl segl, og mær dámar væl sangin "Eg sigli fram yvir lívsins hav." Hugskotið aftanfyri listaverkið, er at tað skal vera lívsins hav, og tá helt eg, at tilfarið mátti vera fólkahár, greiðir Tita frá.

Hárið til listaverkið hevur hon fingið frá hárfríðkanarstovum í øllum landinum, og tilfarið til seglini var 12 kilo av hári, sum Tita hevur spunnið til garn.

– Tað eru fýra segl, og uppsetingin ger, at seglini kundu passa til eitt far. Eg havi ikki gjørt seglini so tey skulu svara til eitt ávíst slag av skipi, tey skulu vera til lívsins far. Framsýningin letur upp leygardagin 7. oktober kl. 16, tá Tóri Restorff Jacobsen fer at spæla brot úr cello-suitu eftir Bach. Framsýningin er opin til 22. oktober.

# Sum á jólum í Klaksvík

**Handlarnir í Klaksvík høvdu úr at gera leygardagin, tá ókeypis var at koyra ígjøgnum Norðoyatunnilin, men av løgreglustøðini siga tey at tað var sera friðarligt**

HANDILSLÍV
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Tað var nógv fólk til handils í Klaksvík leygardagin, tá ókeypis var at koyra ígjøgnum Norðoyatunnilin. Úr Klaksvíkar handilsfelagi siga tey, at tað gekk sera væl og tað vóru sera nógv fólk í býnum allan dagin.

– Longu tá vit opnaðu kl. 10 var nógv fólk, og har var fult av fólki líka til kl. 23, tá vit lótu aftur, sigur Bjørghild Magnusson, ið er formaður í Klaksvíkar handilsfelagi.

Fleiri handilsfólk tosaðu um, at tað var sum beint upp til jóla. Tað var bíðirøð í handlunum allan dagin, tey vóru noydd at vera fleiri fólk til arbeiðis enn vanligt, og tey meta seg eisini hava selt líka nógv, sum tey plaga at selja til jóla.

Ta fyrstu vikuna Norðoyatunnilin var opin, var eisini ókeypis at koyra ígjøgnum hann, og tá høvdu handlarnir í Klaksvík leingi opið alla vikuna. Tá vóru eisini nógv fólk til handils, men av tí at handlarnir høvdu leingi opið í eina heila viku, tyktist tað, sum at fólk høvdu minni skund tá, siga tey úr Klaksvíkar handilsfelagi.

Úr Klaksvíkar handilsfelagi meta tey, at tað í øllum førum vóru líka nógv fólk til handils leygardagin, sum tað vóru fyrstu vikuna tunnilin var opin.

Sera nógvir bilar vóru eisini í býnum í Klaksvík leygardagin. Men løgreglan í Klaksvík sigur, at teir merktu einki til nakran ferðslu ruðuleika. Heldur ikki var nakar trupulleiki at fáa bilin settan frá sær.

– Tað hevur víst seg, at vera nógv betri við parkeringini, enn vit væntaðu áðrenn tunnilin læt upp. Vit høvdu roknað við, at tað onkuntíð fór at vera trupult at seta bilin frá sær, men soleiðis hevur tað ikki verið, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Klaksvík.



# Nógvir bilar ókeypis gjøgnum Norðoyatunnilin

Síðsta leygardag var ókeypis at koyra ígjøgnum Norðoyatunnilin.

Hetta er fyrstu ferð at tað var ókeypis at koyra ígjøgnum tunnilin, síðan fyrstu vikuna eftir at tunnilin lat upp, og nógv fólk nýtti møguleikan at fara ein túr til Klaksvíkar. Koyrast kundi ókeypis frá kl. 6 leygarmorgunin 30. september til kl. 6 sunnumorgunin 1. oktober.

6700 bilar fóru ígjøgnum tunnilin hetta samdøgrið. Hetta er væl meir enn tað vanliga, í miðal koyra 1600 bilar ígjøgnum tunnilin um samdøgrið.

Fólk tosaði um, at har vóru næstan líka nógvir bilar, sum tá tunnilin læt upp. Men so nógvir bilar vóru hóast alt ikki.

Leygardagin 29. apríl, tá tunnilin lat upp, koyrdu 5250 bilar ígjøgnum tunnilin, og dagin eftir var talið 12550.

Næstu ferð ókeypis verður at koyra ígjøgnum undirsjóvartunnlarnar, verður sunnudagin 10. desember tá Vágatunnilin verður 4 ár.

**- ella**